# Landsgrannskoðanin
## søkir eftir starvsfólki

Í sambandi við at ein av okkara grannskoðarum er farin úr starvi, verður søkt eftir starvsfólki at byrja 1. september 2009 ella eftir avtalu. Arbeiðið á stovninum er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt og fevnir um at grannskoða almennar stovnar og skipanir.

**Førleikakrøv:**
Hægri útbúgving innan grannskoðan ella roknskap o.l., ella royndir innan almenna /privata umsiting eru avgjørt fyrimunir, men ikki treytir.

Vit leggja dent á, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er arbeiðssamur, nærlagdur, dugir væl at skriva og samskifta við stovnar og starvsfelagar.

**Útbúgvingarmøguleikar:**
Á Landsgrannskoðanini bjóða vit starvsfólki okkara útbúgving og eftirútbúgving. Vit samstarva við norðurlendsku ríkisgrannskoðanirnar, og í tí sambandinum stendur starvsfólkunum í boði at fara á skeið ella at arbeiða styttri tíðarskeið í hinum norðurlondunum.

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum o.ø. skal sendast til:

*Landsgrannskoðanina*
*Traðagøta 43*
*Postrúm 2053*
*165 Argir*
*ella sum teldupostur: postur@lg.fo.*

Umsóknir skulu vera Landsgrannskoðanini í hendi í seinasta lagi 29. juni 2009. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Dam á telefon 355100. Fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

Tú kanst fáa meira at vita um Landsgrannskoðanina á heimasíðu okkara: www.lg.fo.

LANDSGRANNSKOÐANIN er ein óheftur stovnur undir Løgtinginum, sum virkar sambært Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

---

# fk Matseðil

Hósdagin 11. juni
**Nakkafillét / Grýturættur**

Fríggjadagin 12. juni
**Lasagna / Kjøtfrikadellur / Rivjasteik**

Leygardagin 13. juni
**FK-Búffur**

Mánadagin 15. juni
**Stoktur medistari / Fiskafrikadellur**

Týsdagin 16. juni
**Hakkibúffur / Saltkjøt**

Mikudagin 17. juni
**Kjøtfrikadellur / Stoktur fiskur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

---

## NEYST OG BÁTUR Í NÓLSOY TIL SØLU

Um hóskandi boð fæst, verður neystið á matr. Nr. 110 Nólsoy selt. Bátur sum krevur ábøtur er eisini til sølu.

**Tlf.: 315105 el. 223440**

---

## Selja bilin?
– set hann í Sosialin!

Ring og fá ein prís!



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin – blaðið øll lesa!

**Sosialurin**
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo

---

Sosialurin

# SUDOKU

# Fleiri góðar løtur uttandura – alt árið



Hvønn dag í juni mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.




Sendið okkum loysnina innan mánadagin 13. juli 2009 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður í viku 29.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

## Vinningurin í juni

SORRENTO 2,0 KW kvartshitari.

Talan er um ein sera væl umtóktan heilárshitara - Nýtt model.

**Virði: kr. 3.500,-**

Juni-kappingin

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 8 | | | | 1 | | |
| 7 | 5 | | | | | | 2 | 9 |
| | | | | 4 | | | | |
| | 3 | | 7 | | 4 | | 9 | |
| | | 2 | | 8 | | 5 | | |
| | 8 | | 5 | | 3 | | 4 | |
| | | | | 6 | | | | |
| 8 | 4 | | | | | | 5 | 7 |
| | | 9 | | | | 2 | | |

Navn:______________________

Bústaður:______________________

Telefon:______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

Forexs

REX markisur
Vakrar, hentar og álítandi
Skjót og trygg uppseting
Dygd, fyri rættan prís

www.markisur.fo

Markisur Terassuhitarar El-peisir Klimaanlegg Nýtt Grillur Nýtt Kampingútgerð